# BP við fullari ferð móti føroyskum marki



*Tað ber væl til at fáa úrslitini frá seismisku kanningunum til heldar skjótt eftir "skjótingina" um skipini verða støðstappað við teknologiskari útgerð. Tað er hetta sum er hent - nú brýtar skanda undir kanningarnar nær føroyska markinum*

*Ikki færri enn fimm seismiska skip hava gjørt kanningar nærhendis føroyska markinum í summar fyri bretsk og amerikonsk oljufeløg - í morgin fer ein av heimsins best útgjørdu royndarboripallum undir at bora*




*Pílurin vísir okkum, hvar boripallurin Ocean Valiant nú er staddur*

-Veðrið hevur verið okkum til vildar, og vit hava fingið so nógvar nýggjar áhugaverdar upplýsingar frá seismisku kanningunum, at BP-leiðslan gjørdi av at flyta ein av mest framkomnu boripallum sínum úr Norðsjónum til økið vestan fyri Hetland.

Hetta sigur pressutalsmaðurin hjá BP í Aberdeen, Bill Moore við Sosialin, nú tíðindi ganga um, at bretska oljufelagið hevur økt munandi um virksemi sítt á leiðunum við føroyska markið.

## Skjótari

Bill Moore váttar, at tað hevur gingið nógv skjótari enn roknað við. Teir hava havt tvey seismisk skip í økinum og hava serfrøðingarnir umborð viðgjørt upplýsingarnar so hvørt. Upplýsingarnar eru so mikið greiðar og áhugaverdar, at avgerð varð tikin um at bora eitt nýtt hol nærhendis tí risastóru oljukelduni, sum ein líknandi boripallur fann í fjør.




*Boripallurin, sum nú er nærhendis føroyska markinum er av sama slag sum hesin, ið fann olju í økinum í fjør*

Bill Moore váttar eisini, at bretska felagið metir økið vestan fyri Hetland sum eitt spennandi og lovandi oljuøki. - Vit vilja hava so nógvar upplýsingar sum tilber nú beinanvegin, soleiðis at vit betri kunnu stinga út í kortið eina framleiðsluætlan fyri alt hetta økið sigur pressutalsmaðurin hjá BP.

## Stinga út í kortið

Hann sigur, at royndarboripallurin "Ocean Valiant" kemur á staðið í dag ella í morgin og farið verður so at bora alt fyri eitt. Ætlanin er at fáa upplýsingarnar til Aberdeen sum skjótast, soleiðis at endalig avgerð kann verða tikin um, hvat skal gerast í 1994 og næstu árini. Alt veldst um úrslitið av boringini. Gevur hon eitt positivt úrslit ber til at leggja allan útviklingin í økinum til rættis longu í ár. Nær byrjað verður at framleiða olju úr økinum er ilt at siga, men sambært sjónvarpinum týskvøldið verður umhugsað at fara undir framleiðslu um fá ár.

**jan**

---

# KAPPINGIN

## 15 SPURNINGAR UM SKOTLAND



**5. Spurningur**

Hvussu kallast heimskenda tónleikatiltakið, sum á hvørjum ári verður hildið á Edinburgh Castle?

Svar: ______________

Fyri at vera við í lutakastinum um

**10-DAGA SKOTLANDSFERÐ**

v/ bili & børnum undir 14 ár og uppihaldi á trimum frálíkum skotskum hotellum í eina viku

**2 SNARFERÐIR FYRI TVEY**

til Aberdeen

**10 SKOTSK TURRIKLØÐ**

og **4 SWEAT SHIRTS**

skulu tit bert svara 15 spurningum um Skotland. Spurningarnir eru í blaðnum dag um dag. Tann fyrsti var í blaðnum leygardagin 11. sept.

Seinni lýsa vit, nær svaraðu spurningarnir skulu sendast okkum.

Drigið verður, so vinnararnir av ferðunum kunnu nýta ferðirnar í heystfrítíðini.

Greinin á síðu 16 & 17 í hósdagsblaðnum 9 sept. hjálpir tykkum at svara spurningunum